Kommunufelagið

VINNUMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
28. januar 2015

Okkara j.nr.
14/01932-4

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

**Viðv.** ***Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging***

Vinnumálaráðið hevur 06. januar 2015 sent Kommunufelagnum "uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging", til hoyringar.

Kommunufelagið hevur ongar viðmerkingar til tær broytingar sum eru í uppskoti. Hinvegin vil Kommunufelagið enn einaferð gera vart við, at § 15 í galdandi lóg um arbeiðsskaðatrygging eigur at verða broytt.

Táverandi Kommunusamskipan Føroya mælti í hoyringsskrivið 22. august 2008 og aftur 10. februar 2012 til, at kommunurnar á sama hátt sum landið kundu lata verði við at lata ábyrgdarvandan sambært hesi lóg til eitt tryggingarfelag, men í staðin velja at verða sjálvtryggjaðar.

Grundgevingarnar fyri at áleggja kommununum tryggingarskyldu eru at síggja í viðmerkingunum til uppruna lógina og eru soljóðandi, "við at áleggja øllum føroysku kommununum og øllum privatum arbeiðsgevarum tryggingarskyldu, slepst undan, at tryggjaði orsakað av vantandi fíggjarorku hjá kommununi ella arbeiðsgevaranum ikki fær tær veitingar, sum hann sambært lógini hevur rætt til, eins og henda skipan tryggjar, at kommunan ella arbeiðsgevarin ikki kemur í fíggjarligt óføri orsakað av krøvunum".

Kommunufelagið metir ikki at hesar grundgevingar eru nøktandi. Kommunurnar eru gaman í ymiskar í støðd og harvið eisini í fíggjarorku. Men fleiri av kommununum hava neyðugu fíggjarorkuna til at taka váðan á seg. Síðani eldraøkið gjørdist kommunalt, er kommunali búskapurin harumframt vaksin munandi.

Kommunufelagið mælir tí staðiliga til, at kommunurnar og kommunalu samstørvini á eldraøkinum, verða javnt stillað við landið, og at § 15 stk.1 og 2 verða broytt samsvarandi hesum

Vegna

Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 30 · Postboks · 53 FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · Fax +298 302481 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**